# NSÍ snýtti fuglfirðingar

*2. deild: NSÍ er nú á odda í næstbestu deildini, eftir at tað eydnaðist teimum at vinna torføra útidystin í Fuglafirði*

ÍF–NSÍ 0–1 (0–1)

Hesa vikuna liggur besta fótbóltsliðið í Runavík tungt í sjónum. Kanska er tað ein uggi, at tað liggur so nógv betri fyri hjá næstbesta liðnum. NSÍ er á odda í 2. deild, og tað er ikki púra við síðuna av at ímynda sær møguleikan, at teir flyta upp, samstundis sum 1. deildarliðið flytir niður!

Fuglfirðingar fluttu niður í fjør. Teir stríðast við at samanspæla eitt lið, sum skal standa seg so mikið væl, at tað kanska flytir upp aftur. Við hvørt hevur tað hilnast væl hjá ÍF, men ungu menninir eru óstøðugir.

Leygardagin var tað heilt greitt, at NSÍ var ikki komið til Fuglafirðar at undirhalda. Tann partin lótu teir heimaliðið hava ábyrgdina av, og tað var ein trupulleiki hjá ÍF.

Tey árini, tá ÍF hevur stríðst fyri at yvirliva í 1. deild, hava teir ikki hugsað so nógv um at skapa spælið. Tá teir eru oddalið í 2. deild lata mótstøðuliðini ÍF um at mynda, og so dúva tey upp á kontra spælið, og soleiðis var tað leygardagin.

Fyrsta korterið høvdu fuglfirðingar tríggjar ella fýra góðar royndir móti málinum hjá NSÍ, men Rúni Petersen, Bárður á Lakjuni og hinir menninir frammarlaga á vøllinum misnýttu. Spurningurin er, hvussu tað hevði tørnað út, um teir høvdu havt skorað. Teir skoraðu ikki, og tað hevði fyrst og fremst Ólavur Højgaard í NSÍ málinum heiðurin av.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki noyddist Bárður á Lakjuni at taka seg burturúr, tí hann var skaddur. Tað var ein dyggur smeitur fyri ÍF.

NSÍ skoraði, tá seytjan minuttir vóru farnir. Uppspælið var í vinstru. Høgni á Lakjuni, sum í ár er komin til NSÍ úr Fuglafirði, har hann býr og arbeiðir!, lyfti úr vinstru tvørturum til handara stólpa. ÍF málverjin drálaði, og so kom miðvallarin Bergur Djurhuus og setti fótin á.

Seinna umfarið bara vardi NSÍ. Jákup Martin Jacobsen var ein brandur í miðverjuni, og veteranurin Eyðun Gaardbo hjálpti honum við øllum sínum royndum. Tað gjørdi so mikið góðan mun, at ÍF ikki megnaði at fáa mál. Og so var hýrurin í Fuglafirði sjálvandi vánaligur.

JH

# Sundalagið hálvsnávaði

*2. deild: Gøtumenn fingu heldur óvæntað annað stigið við sær av Eiði, tá teir leygardagin tóku ímóti EB/Streymi*

GÍ–EB/Streymur 1–1 (1–0)

Tey fyrstu umførini gekk rættuliga undan hjá Bergi Magnussen og EB/Streymi. Men nú kom stígur í. Fyrst heilkiksaðu teir á heimavølli móti KÍ, og leygardagin hálvkiksaðu teir í Gøtu.

EB/Streymur hevði bóltin nógv størsta partin av tíðini. Serliga í 1. hálvleiki vóru teir greitt omaná. Janus Rasmussen og Símun Petur Justinussen hava verið krumtappurin á GÍ liðnum, men hesa ferð var Janus ikki við, tí hann var skaddur, og Símun Petur, sum hevur ábyrgdina av næstbesta liðnum, setti ikki seg sjálvan inn, fyrrenn 2. hálvleikur var væl liðin.

EB/Streymur hevði Brian Jensen og gomlu GÍ kempuna, Jón Sigurd Gleðisheygg, í álopinum. Stóru menninir stríddu seg til møguleikar, og Jón Sigurd hevði einar tríggjar í 1. hálvleiki, sum hann átti at hava skorað uppá. Serliga var møguleikin stórur, tá hann hevði fingið bóltin av aftasta manninum hjá GÍ, Jan Skoradal, men skotroyndin var so miseydnað, at málverjin, Hallur Hansen noyddist at fara fram eftir bóltinum, sum ikki orkaði inn móti strikuni!

GÍ hevði fáar og smáar møguleikar í 1. hálvleiki, men tað eydnaðist teimum at skora, tá vanliga leiktíðin var farin. Omar Pálsson, sum var miðvallari, hevði síðsta fótin á.

Í 2. hálvleiki var EB/Streymur framvegis spælstýrandi. GÍ var kortini meiri við, enn teir høvdu verið undan steðginum, og tá tað restaðu tveir minuttir, áttu teir at havt sligið sigurin fastan. Heini Heinason stríddi seg ígjøgnum í vinstru, hann legði upp á tvørs til Per Dalheim, sum var innkomin. Vinkulin hjá honum var í so spískur, og hann valdi heldur at leggja aftur fyri føturnar á Heina, sum var komin í málteigin. Men ólukkutíð fyri GÍ, so sendi álopsmaðurin skeivu megin stólpan.

Vanliga leiktíðin var um at vera runnin, tá EB/Streymur fekk fríspark dygst uttanvert brotsteigin. Finnbjørn Zachariassen smekkaði flatt móti verjugarðinum, onkur hoppaði upp frá, og bólturin streyk í meskarnar aftanfyri Hall Hansen, áðrenn dómarin bríkslaði av.

Komandi leygardag eru havnarliðini á skránni hjá EB/Streymi og GÍ. Gøtumenn skulu í Gundadal at spæla móti HB, og EB/Streymur fær vitjan av B36.
jh



# Floytan løgd á hillina

*Orsøkin til avgerðina er, at dómarabólkurin kennir seg stungnan í ryggin av nevndini í dómarafelagnum*

JÁKUP MØRK

Tað var ein sera harmur Oddmar Andreasen, sum um vikuskiftið boðaði frá, at hann í samráð við hjálpardómarar sínar nú hevur gjørt av leggja floytuna á hyllina.

- Fótbóltsdómarafelagið hevur stungið okkum í baki við avgerini um at avgreiða dystirnar um vikuskiftið, og hetta meta vit okkum ikki kunna liva við, sigur Oddmar Andreasen.

- Orsøkin til at sigi soleiðis er, at nevndin fríggjakvøldið ella leygardagin hálsaði um, og kolldømdi avgerðina, sum eini 80% av møttu limunum høvdu samtykt hóskvøldið.

### Ikki nøkur nýggj støða

At talan skal vera um eina aðra støðu, nú FSF hevur boðið dómarafelagnum á fund, er Oddmar als ikki samdur í.

- Vit tosaðu um hetta hóskvøldið, og semja var um, at dystirnir skuldu ikki dømast, hóast FSF kom við einum útspæli fríggjadagin, tí hetta væntaðu vit frammanundan fór at koma.

- At nevndin so eisini fer aftur um bakið á okkum, og tosar við dómararnar hvør sær, fyri at trýsta teir til at døma, meti eg vera eina somikið ljóta gerð móti okku, at eg als ikki skilji, hví vit skulu hava nakra nevnd at umboða okkum. Mín áheitan skal tí vera, at nevndin leggur frá sær sum skjótast, áðrenn hon verður koyrd frá.

At fleiri dómarar so eisini velja at geva eftir fyri trýstinum, sum verður lagt á teir, er sjálvandi eisini at harmast um. Tað nærmasta eg kann koma einum orði fyri hetta er »skrúubrækkai«, og hetta sigur kanska eisini eitt sindur um, hvussu veikt dómarafelagið í veruleikanum er.

Formaður felagsins er snøgt sagt tikin av ræði av øðrum nevndarlimum og FSF, og einasta, sum okkara dómarabólkur frættir um málið er, tá vit leygardagin hoyra í Útvarpinum, at dystirnir kortini verða leiktir, og hetta haldi eg vera undir alt lágmark.

### Láturligt

Oddmar heldur eisini lítið um, at FSF í síni roynd at fáa dystirnar avgreiddar, hevur latið lítið um ítróttarligu avgreiðingina av dystunum. Sum dømi um hetta nevnir hann dysitn á Sandi, har ein óroyndur dómari varð settur at døma ein dyst, sum kundi hava alstórar avleiðingar fyri liðini, og tí var kanska væntandi, at talan fór at gerast um dyst, sum varð torførur at døma.

- Ikki tí, eg havi alt gott at siga um Lars Müller, sum dømdi dystin, og tað gleðir meg eisini, at allir partar tóktust nøgdir um døming hansara, men tað kundi eins væl gingið galið, tá ein somikið óroyndur dómari verður settur at døma.

### Hugstoytandi

Spurdur, um tað ikki er hugstoytandi at skula gevast við dømingini á slíkan hátt, sigur Oddmar, at tað er so avgjørt.

Eg eri sera harmur um, at alt skuldi enda soleiðis, tí eg havi verið sera fegin um at havt møguleikan at døma á hæsta stigi her heima.

Síðani hetta málið tók seg upp, havi eg tó upplivað at verið spiltur út meira ella minni alment, og eitt nú hava tey, sum vara at heimasíðuni hjá HB verið noydd at strikað ymsar viðmerkingar, tí hesar snøgt sagt hava verið ov grovar.

Hetta er sjálvandi eisini nakað, sum ávirkar hugin skeiva vegin, og alt í alt er tað alt annað enn stuttligt at skula siga farvæl til dømingina.

Sum støðan var helt eg meg tó ikki kunna handla øðrvísi, og tí er floytan løgd á hillina med alla.




# EVNISDAGAR
## um sálarliga viðgerð

Í samstarvi við ein bólk frá "Institutt for Aktiv Psykoterapi" í Oslo skipar felagið "Føroyskir Sálarfrøðingar" fyri tveimum evnisdøgum á Føroya Læraraskúla 14. og 15. august 2000.

***Foredragsholdere:***
Sjefpsykolog og klinisk spesialist Stein Rønnow, advokat og psykolog Grethe Nordhelle, psykolog Morten Nystrøm, barnevernspedagog og mødrehjemsleder Ingrid Kviberg, psykolog Kjersti Karlsen, spesialpedagog og rusterapaut U. S. Sakhi.

***Tema:***
***Ny identitet i voksenalder***

***Familieterapi – innspil fra en tradisjon***

***Psykoterapi av personlighetsforstyrrelser***

***Barn med Asberger's syndrom***

***Vold i hjemmet – ulike perspektiver***

***Ungdom og rusmisbruk***

***Behandling av sosiale utsatte mødre***

***Bevisstgjørelse av komfliktopptrappende og avspennende språk.***

Begge dager: Workshops og paneldebatt

***Málbólkur:***
Fakfólk sum starva við viðgerð á stovnum, sjúkrahúsum og klinikkum, pedagogar, sjúkrasystrar og røktarar, heilsusystrar, læknar, sosialráðgevarar, barnaverndir, prestar og onnur við áhuga fyri sálarfrøðiligum evnum.

***Kostnaður fyri luttøku báðar dagar:***
1.500,- kr. íroknað døgurði, kaffi, skrivligt tilfar v.m.

## *N.B. Avmarkað luttakaratal!*

Áhugað ringið tel. 314522 (Sernámsdepilin), millum kl. 13.00 og 15.00 og tit fáa semt tilmeldingarblað og skrá.

Seinasta freist at tilmelda seg er 20. juni 2000.

**Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar**

Sosialurin · 311820



***Roknskaparleiðari*** til
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

**Til Tryggingarfelagið Føroyar verður søkt eftir roknskaparleiðara.**

***Starvið***
Leiðarin stendur fyri roknskapardeildini og skal skipa fyri, at deildin altíð virkar væl og er ajour við sínum arbeiði.
Roknskaparleiðarin hevur m.a. ábyrgdina av

*Perioduroknskapum, deildarroknskapum, ársroknskapum og øðrum møguligum roknskaparuppgerðum fyri allar deildir og dótturfeløg*

*fíggjarætlanum og uppfylging av teimum*

*likviditetsuppgerðum*

*hagtølum*

***Førleiki***
Tann, sum setast skal í starvið, má hava góðan roknskaparligan førleika, og dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir, leiðaraevnir- og royndir. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

***Umsókn***
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi hósdagin 22. juni 2000.

*Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gunnar í Liða, stjóra.*

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*The Faroe Insurance Company*

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355



# LUTASEÐIL



1. Toyota Corolla Hatchback (Frá Reyni Service) — virði 169.400 kr.
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm við frítíðaruppihaldi í 1 viku í Danland (Frá Smyril Line) — virði 15.000 kr.
3. Gávukort frá Th. Dam á Hálsi — virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Shell — virði 5.000 kr.
5. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
6. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
9. Apex ferðaseðil fyri 1 persón — virði 2.800 kr.
10. Føroyskt krov — virði 1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 7. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 8. og 9. august 2000.
Eisini verða vinnaratølini løgd út á heimasíðu: www.sporthal.fo

Hestprent 314 555

STATOIL

**Tórshavnar Ítróttarráð**
**2000** **20 kr.**



# Starvsfólk til goymsluna

**Goymslan**

Søkt verður eftir einum starvsfólki til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. august ella skjótast møguligt.

Á goymsluni starvast 6 fólk og høvuðsuppgávurnar eru: vørumóttøka, skráseting, prísjavnan, tollavgreiðsla, frakt og vøruútflýggjan og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

Tann, sum settur verður, skal fyrst og fremst fáast við toll- og fraktavgreiðslu, men má eisini rokna við at skula taka sær av øðrum uppgávum á goymsluni.

**Tín førleiki:**
Tú skal hava útbúgving sum goymslufólk, skrivstovufólk ella hava royndir í arbeiði við toll og frakt. Dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Eisini er fyrimunur um tú hevur**
- royndir við edv (á brúkarastøði)
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Kunnleiki til enskt er ein fortreyt.

Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Mikkelsen á tlf. 303030 lok. 3224.

Umsóknir við hjáløgdum prógvum og CV skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. juni 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355



sosialurin sosialurin -har tað hendir